A

Tórshavn, tann 21. november 2011
J.Nr.: 201000058 / 29
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Víðvíkjandi klagu tygara, dagfest 21. juni 2010**

Tygum hava sent mær eina klagu um viðgerðina hjá Mentamálaráðnum av fleiri innlitsumbønum, sum tygum hava sent ráðnum. Klagan snýr seg um 6 innlitsumbønir, sum Mentamálaráðið annaðhvørt ikki hevur svarað, ella sum tygum meta, tygum hava fingið eitt ófullfíggjað svar uppá.

Mentamálaráðið hevur við skrivum, dagfest 8. juli og 8. november 2010 latið mær viðmerkingar til klagu tygara og viðgerðina av innlitsáheitanunum, og tygum hava tann 9. september 2011 gjørt viðmerkingar til fyrra skriv Mentamálaráðsins.

Niðanfyri viðgeri eg klagu tygara saman við svarunum hjá Mentamálaráðnum, skjølunum í málinum og viðmerkingum tygara:

**Tygum** biðja tann 19. november 2009 Mentamálaráðið um innlit í øll skjøl í einum máli, sum snýr seg um at velja og siga fólki úr ávísum uppgávunevndum undir Mentamálaráðnum, og tann 26. november 2009 um innlit í viðgerðina av kæru tygara um uppsøgn úr starvi á Vinnuháskúlanum.

**Mentamálaráðið** hevur tann 8. desember 2009 latið tygum avrit av øllum skjølum í persónsmáli tygara, herímillum viðgerðini av kæru tygara um uppsøgnina. Umframt hetta fingu tygum 85 skjøl viðv. próvtøkum og uppgávunevndum. Mentamálaráðið upplýsir í skrivi til mín tann 8. juli 2010, at ráðið ikki hevur onnur skjøl hesum máli viðvíkjandi.

*Eg kann ikki annað enn út frá frágreiðingini hjá Mentamálaráðnum staðfesta, at tygum hava fingið útflýggjað skjølini í málinum. Sambært viðmerkingum tygara framganga svarini upp á spurningar tygara til Mentamálaráðið tó ikki av skjølunum. Mentamálaráðið hevur ikki í sambandi við innlitsumbønir skyldu til at framleiða nýggj skjøl, og hóast eg haldi, at Mentamálaráðið í sambandi við, at skjølini vórðu útflýggjað, átti at greitt tygum frá, at svarini upp á settu spurningarnar ikki framgingu av skjølunum, haldi eg tó ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hendan partin av klagu tygara.*

**Tygum** biðja tann 16. mars 2010 Mentamálaráðið um innlit í eina telefonsamrøðu millum B, deildarleiðara, og C, skúlastjóra, tann 27. januar 2009. Mentamálaráðið svarar ongantíð innlitsumbønini.

**Mentamálaráðið** sigur, at av tí, at tygum ikki hava sent teldubrævið til teldupostbústaðin mmr@mmr.fo, (umbønin er send til deildarstjóra í Mentamálaráðnum) er umbønin av misgáum ikki skrásett ella avgreidd.

*Tað er als ikki nøktandi, at ein innlitsáheitan send í einum teldubrævi til Mentamálaráðið ikki skjótast gjørligt verður skrásett og avgreidd, og eg kann ikki góðtaka frágreiðingina hjá Mentamálaráðnum um orsøkina til, at hetta ikki varð gjørt. Tá Mentamálaráðið hevur almannakunngjørt teldupostbústaðirnar hjá starvsfólkum ráðsins, so má eisini gangast út frá, at borgarar venda sær beinleiðis til starvfólkini við fyrispurningum, umbønum v.m. Eg fari tískil at heita á Mentamálaráðið um at skipa mannagongdir, sum tryggja, at viðkomandi fyrispurningar og umbønir v.m., sum verða sendir starvsfólkunum beinleiðis, eisini verða skrásettar í ráðnum.*

Í frágreiðing til mín upplýsir Mentamálaráðið, at ráðið ikki hevur skrivað nakað notat frá nevndu samrøðu, men at stjórin á Vinnuháskúlanum hevur skrivað eitt notat frá umrøddu samrøðu, sum Mentamálaráðið hevur.

*Mentamálaráðið sæst ikki hava tikið støðu til, um tygum hava rætt til innlit í nevnda skjal. Eg havi tí í dag biðið Mentamálaráðið um at taka støðu til hetta skjótast gjørligt og boða tygum frá niðurstøðu ráðsins.*

**Tygum** biðja tann 28. mars 2010 um fullfíggjað skjalayvirlit í máltali … . Mentamálaráðið sendir tygum dagin eftir skjalayvirlitið, sum skjalaskipanin ger sjálvvirkandi, umframt *øll* skjøl í málinum. Mentamálaráðið viðmerkir samstundis, at tygum hava fingið sama skjalatilfar útflýggjað tann 8. desember 2009. Í klaguni gera tygum vart við, at skjalayvirlitið ikki var fullfíggjað av tí, at fleiri raðnummur vantaðu í yvirlitinum.

*Talan er um raðnummar 17 og 35. Sambært skjalayvirlitinum, sum Mentamálaráðið hevur sent mær, er skjal 17 eitt skriv, dagfest 25. august 2009, frá Mentamálaráðnum til tygara, har viðmerkingarnar frá Vinnuháskúlanum til kæru tygara um uppsøgnina verða sendar tygum til hoyringar. Skjal 35 er eitt útgangandi skriv frá Mentamálaráðnum til umboðsmanninum, dagfest 8. mars 2010, har Mentamálaráðið sendir umboðsmanninum eina frágreiðing og skjølini í málinum um uppsøgn tygara.*

**Mentamálaráðið** hevur greitt frá, at orsøkin til, at tvey raðnummur ikki síggjast í øllum útgávunum av yvirlitinum, er, at ávísu skjølini ikki vóru endaliga avskrivað til journalina í DocuLive skipanini, tá skjalayvirlitini vórðu útskrivað.

*Vísandi til at tygum sambært frágreiðingini hjá Mentamálaráðnum hava fingið øll skjølini í málinum, og eg ikki hava orsøk til at seta spurnartekn við frágreiðingina hjá Mentamálaráðnum um skjalayvirlitini, havi eg ikki grundarlag fyri at gera meira við hendan partin av klagu tygara.*

**Tygum** biðja í tveimum teldubrøvum tann 7. apríl 2010 um innlit í eina fundarfrásøgn frá einum fundi millum Mentamálaráðið og Vinnuháskúlan tann 19. januar 2009 og skjalayvirlitið í einum ávísum máli, har navn tygara er nevnt. Tygum fingu ongantíð nakað svar uppá hesar innlitsaheitanir.

**Mentamálaráðið** hevur greitt frá, at innlitsáheitaninar í fyrstu atløgu vórðu steðgaðar av einum elektroniskum ”spamfiltri”, men at tær dagin eftir vórðu skrásettar í skjalagreiðsluni, og at hetta er orsøkin til, at áheitaninar ikki eru svaraðar. *Eg skilji ikki rættiliga hesa frágreiðingina hjá Mentamálaráðnum, tí sum nevnt vórðu áheitaninar skrásettar í ráðnum longu dagin eftir, at tær vórðu sendar.*

Um umbidnu fundarfrásøgnina sigur Mentamálaráðið, at ráðið onga frásøgn hevur frá nevnda fundi. *Av tí at eg ikki havi møguleika at kanna ella gera av, hvat fór fram á hesum fundi, og um Mentamálaráðið hevði skyldu at skriva upp upplýsingar, sum komu fram á nevnda fundi, havi eg ikki grundarlag fyri at finnast at Mentamálaráðnum fyri ikki at hava skrivað eina frásøgn frá fundinum. Av tí at Mentamálaráðið onki skjal hevur hesum viðvíkjandi at lata innlit í, geri eg ikki meira við hendan spurningin.*

Hvat viðvíkur umbidna skjalayvirlitinum í máltali ….. , so sigur Mentamálaráðið í frágreiðing til mín, at tygum fingu hetta 8. desember 2009 og 29. mars 2010. *Hetta dugi eg ikki at síggja út frá teimum skjølum, sum eg havi havt í málinum, tó at tað greitt sæst, at tygum nevndu dagar fingu skjalayvirlitið í máltali ... . Eg havi tískil í dag heitt á Mentamálaráðið um at viðgera og taka støðu til hesa innlitsumbøn tygara skjótast gjørligt og boða tygum frá niðurstøðu síni.*

Burtursæð frá omanfyri nevndu viðmerkingum og tilmælum geri eg ikki meira við hetta málið.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður